# Tilmæli til Eysturkommunu um skipan av tilboði til 3. - 10. flokk



**Arbeiðsbólkur:**

**Maj-Britt Jacobsen, Noomi Reinert,**

**Malan Steinhólm, Arnfinnur Nesá,**

**Elinborg Osvaldsdóttir, Ove Heinesen, og**

**Aslaug Gisladóttir, AG Consult.**

**26.09.2024**

AG CONSULT

# Innihaldsyvirlit

1. Byrjan ........ 3
2. Hví gera frítíðartilboð til 3. - 10. flokk? ........ 4
2.1 Fyribyrging hjá teimum ungu móti harðskapi, herverki o.s.fr. ........ 4
2.2 Fremja góða sálarheilsu ........ 4
2.3 Styrkja felagsskapin millum børn og ung ........ 5
2.4 Alternativ til øktu skíggjanýtsluna ........ 5
3. Hvussu stórur er tørvurin á tilboði til 3. - 10. flokk? ........ 7
3.1 Luttøka hjá 0. - 3. flokki í frítíðartilboðum uttanlands ........ 7
3.2 Luttøka hjá 4. - 7. flokki í frítíðartilboðum uttanlands ........ 7
3.3 Innihald og góðska á tilboðum ........ 8
3.4 Hvat siga børnini? ........ 9
4. Hvørji kommunal frítíðartilboð eru í Føroyum? ........ 11
4.1 Ansing til tey yngstu ........ 12
4.2 Frítíðartilboð/ungdómshús til børn og ung ........ 12
5. Eysturkommuna ........ 14
5.1 Støðan á barna- og ungdómsøkinum í 2009 ........ 14
5.2 Støðan á barna- og ungdómsøkinum í 2018 ........ 14
5.2 Støðan á barna- og ungdómsøkinum í 2024 ........ 15
5.3 Hvat siga tey sjálvbodnu í Eysturkommunu? ........ 15
5.4 Hvat siga foreldrini at børnum í 3. - 10. flokki – Spurnakanning aug. 2024 ........ 15
5.4.1 Úrslit frá spurnakanningini í Eysturkommunu 2024: ........ 16
5.4.2 Hvørjum er barnið sum oftast saman við eftir skúla, inntil tit koma heim frá arbeiði? ........ 17
5.4.3 Gongur barn títt til ítrótt ella annað frítíðarítriv? ........ 18
5.4.4 Hvussu metir tú útboðið av frítíðartilboðum vera í kommununi? ........ 19
5.4.5 Manglar eitt alternativ til verandi barna -og ungdómstilboð í kommununi? ........ 20
6. Tilmæli frá arbeiðsbólkinum ........ 21
6.1 Tilmæli til hølisviðurskifti: ........ 22
6.2 Manning av tilboði - Normering úr Danmark til íblásturs ........ 22
**Samanumtøka** ........ 23

## 1. Byrjan

Eysturkommuna setti í juni 2024 ein arbeiðsbólk at greina, hvørt verandi frítíðartilboð til 3. - 10. flokk er nøktandi, ella hvørt tørvur kundi verið á einum alternativi.

Aslaug Gisladóttir, AG Consult var sett sum verkætlanarleiðari at samskipa arbeiði hjá arbeiðsbólkinum, sum fevndi um lokalar eldsálir, ið hava við børn, ung og frítíðarvirksemi í kommununi at gera. Harumframt var kommunan umboðað í bólkinum við leiðaranum fyri økið Børn og ung.

Limirnir í arbeiðsbólkinum vóru:

**Malan Steinhólm:** Malan er 47 ár, útbúgvin ergoterapeutur og arbeiðir á Almannaverkinum við fjølbrekaðum børnum og ungum. Malan hevur í mong ár verið virkin innan ymiskt frítíðarvirksemi í Eysturkommunu, sum dømi svimjivenjari, fótbóltsvenjari, virkin í kapplóðrarfelagnum Tindi, hevur sitið í nevndini hjá svimjifelagnum Reysta og er virkin í Missiónshúsinum í Leirvík. Hon eigur 4 børn í aldrinum 13-22 ár.

**Elinborg Osvaldsdóttir:** Elinborg er 40 ár og útbúgvin fólkaskúlalærari, M.A. í føroyskum og útbúgving innan føroyskt sum annaðmál. Arbeiðir við ungum á Miðnámi á Kambsdali. Elinborg er forkvinna fyri sunnudagsskúlaarbeiði í missiónshúsinum í Gøtu og hevur verið virkin í barna -og ungdómsarbeiðinum innan Heimamissiónina í nógv ár. Hon eigur 3 børn í aldrinum 5 - 10 ár.

**Arnfinnur Nesá:** Arnfinnur er 38 ára gamal og útbúgvin námsfrøðingur. Arnfinnur er lærari á serbreytini á Tekniska skúla í Klaksvík og mentor í frítíðini fyri ung við serligum avbjóðingum. Arnfinnur er formaður í sjónleikarafelagnum Losjan Glotti, í nevndini hjá MÁF, Leiklistaráðnum, umframt venjari hjá børnum í fótbólti og svimjing. Hann eigur eitt barn, ið er 5 ár.

**Noomi Reinert**: Noomi er 46 ára gomul og útbúgvin lærari. Noomi arbeiðir í Runavíkar kommunuskúla. Noomi er forkvinna í MÁF innan sjónleik og hevur seinastu tíggju árini havt frálæru í drama, m.a. í Losjan Glotti og luttikið í altjóða sjónleikarafestivalum. Noomi hevur eisini drúgvar royndir sum samskipari av ymiskum ungdómsverkætlanum gjøgnum Runavíkar kommunu í samstarvi við ungdómshúsið Gulu Smiðju. Hon eigur trý børn í aldrinum 8 – 27 ár.

**Maj-Britt Winter Hentze Jacobsen:** Maj-Britt er 50 ára gomul. Maj-Britt arbeiðir sum hjálparfólk í Frítíðarheiminum á Gásamýri. Maj-Britt hevur drúgvar royndir innan sjónleik og hevur staðið fyri føroyskum dansi til børn í kommununi. Maj-Britt er virkin innan kapplóðrarfelagið Tind og er ein av eldsálunum í sjálvbodnum arbeiði innan børn og ung. Hon eigur tvey børn í aldrinum 15-17 ár umframt tvey vaksin børn.

**Ove Heinesen:** Ove er 55 ár og arbeiðir í umsitingini hjá Eysturkommunu. Ove hevur ábyrgd av og umsitur økið Børn og Ung og situr harumframt í leiðsluni í Eysturkommunu.

Arbeiðssetningur :

***Er tørvur á einum kommunalum tilboði til aldursbólkin 3. - 10. flokk í Eysturkommunu og í so fall, hvussu eigur eitt tílíkt tilboð at síggja út?***

***Bólkurin var eisini biðin um at gera tilmæli til møguliga staðseting og hølisviðurskifti.***

Í sambandi við arbeiðið metti arbeiðsbólkurin tað neyðugt at savna meira vitan innan økið, tí hví skulu vit yvirhøvur hava kommunal frítíðartilboð til børn og ung? Hava tey ikki nóg nógv at ganga til? Og hví kunnu

børnini ikki bara, sum fyrr, fara út at spæla? Skulu vaksin altíð seta alt í gongd fyri tey? Hesar og aðrar viðkomandi spurningar, hevði arbeiðsbólkurin tørv á at kanna nærri.

Av tí at trupult hevur verið at funnið hagtøl og greiningar úr Føroyum um skipan av barna- og ungdómsøkinum, hevur arbeiðsbólkurin lutvíst hugt at kanningum innan økið úr Danmark, men eisini tosað við fólk úr ymiskum kommunum, sum standa fyri frítíðartilboðum. Tað fara vit at hyggja nærri at nú.

## 2. Hví gera frítíðartilboð til 3. - 10. flokk?

Í Danmark verða frítíðartilboð sæð sum ein loysn til at menna børn og teirra felagsskapir. Frítíðartilboð verða eisini nýtt sum amboð at lofta teimum børnum, sum ikki eru virkin í frítíðini og/ella illa megna at gerast partur av felagsskapum við teirra javnaldrar. Her verður eisini stór áherðsla løgd á, at einki trýst, kapping ella avrik er neyðugt fyri at luttaka í kommunalum frítíðartilboði. Talan er meira um ein frístað til børn og ung við vaksnum, sum stýra og seta góðar karmar fyri øll.

### 2.1 Fyribyrging hjá teimum ungu móti harðskapi, herverki o.s.fr.

Royndirnar úr Føroyum vísa, at frítíðartilboð til børn og ung hava fyribyrgjandi ávirkan á tey ungu og heldur teimum frá at fremja herverk og líknandi neiligan atburð. Húsið í Klaksvík varð sett á stovn fyri at betra um viðurskiftini hjá teimum ungu, sum tá vóru ein trupulleiki í býnum, tí tey gjørdu nógv, ið tey ikki skuldu.

**Føroya Politi og SSP rósa stórliga ungdómshúsunum** Húsið í Klaksvík og Margarinfabrikkini í Tórshavn fyri teirra stóra fyribyrgjandi árin á býarlívið.

Í Vágum hava tey havt stórar trupulleikar av rúsandi evnum heilt niður í 12-ára aldur hjá børnum, og tí hava tey eisini sett eitt ungdómshús á stovn, so tey ungu hava eitt stað at vera og savnast í tryggum og mennandi kørmum, ið heldur teimum frá skeivu gongdini.

Í Eysturkommunu hevur tað seinastu árini hevur verið ein neilig gongd við ungum, ið fremja herverk og líknandi. Ung, sum ikki hava nakað stað at vera og “hanga út” um kvøldarnar, og tí kanska heldur finna upp á okkurt á tí neiligu síðuni.

Stovnan av kommunalum frítíðartilboði kann sostatt nýtast sum eitt amboð at venda gongdini, samstundis sum tað er eitt høvi at skapa eitt sunt og jaligt alternativ í tryggum kørmum til børn og ung, sum kanska ikki eru til ítrótt og lættliga kunnu fella uttan fyri felagsskapin.

### 2.2 Fremja góða sálarheilsu

**Ver virkin, ver saman, ver hugbundin,** eru ráð frá Fólkaheilsuráðnum at betra um trivnaðin og sálarheilsuna hjá okkara børnum og kann eitt kommunalt frítíðartilboð nýtast sum eitt amboð til júst hetta endamál.

Hóast nógv frítíðartilboð eru í Eysturkommunu við ítrótti, leiklist og dansi v.m., og hesi geva eitt stórt íkast til eitt sunt barna- og ungdómslív, so er høvuðsuppgáva teirra ikki at lofta teimum, sum hava trupult við at luttaka, ikki eru til ítrótt og líknandi, ella sum lætt fella uttan fyri felagsskapin við javnaldrar.

**17% av børnunum í 3. - 10. flokki í Eysturkommunu ganga ikki til ítrótt ella annað frítíðarvirksemi** vísti spurnarkanningin, ið arbeiðsbólkurin gjørdi av foreldrum at hesum børnum. Talan er um eitt rættiliga høgt

tal av børnum og ungum í Eysturkommunu, sum hvørki eru virkin ella saman í frítíðini, sum rátt til av Fólkaheilsuráðnum.

Endamálið við frítíðartilboðum er at vera eitt tilboð til m.a. henda bólkin og breiðari enn bert at vera enn eitt frítíðarítriv, tí talan er um kommunala veiting, har øll kunnu vera við, eisini tey, sum ikki eru til ítrótt, kappingar o.s.fr.

Tøl frá Kommunernes Landsforening, DK, vísa, at í september 2023 fór meir enn 25 % av fíggingini til fólkaskúlarnar til tey 6,5 % av næmingunum, ið tørva eitt sertilboð.

( Vive Magasin, 1. nov. 2023: "Fra spæd til ung – fire nedslag i trivsel og udfordringer". )

Hesi hagtøl eru  áhugaverd at nevna í hesum samanhangi sum ein áminning um, at tað er dýrt fyri eina kommunu, um børn og ung ikki nóg tíðliga vera loftað, og fígging skal finnast til sertilboð.

Ein íløga í frítíðartilboð til 3. - 10. flokk kann tí síggjast sum ein strategisk íløga í børn og ung til tess at styrkja trivnaðin og sálarheilsuna og at fyribyrgja møguligum framtíðar útreiðslum til dýrari serloysnir.

## 2.3 Styrkja felagsskapin millum børn og ung

Er tørvur á at styrkja felagsskapin millum børn og ung? Finna børnini ikki sjálv út av at finna saman og spæla eftir skúlatíð, sum vit gjørdu fyrr? Hvussu trupult kann tað vera?

Okkurt bendir á, at tíðirnar eru nógv broyttar, síðani vit vóru børn. Spurnakanningin úr Eysturkommunu vísir, at **30% av børnunum í 3. - 10. flokki sita einsamøll heima eftir skúla, til foreldrini koma heim frá arbeiði.**

Samstundis vísir kanning hjá Fróðskaparsetri Føroya, at trivnaðurin hjá skúlabørnum nú ikki hevur verið so vánaligur síðani 2007.

Eftir eina góða gongd, har talið av næmingum sum kenna seg happaðan minkaði úr 15 % í 2007 niður í  11% í 2019, tá ið seinasta kanning varð gjørd, gongur nú skeivan veg. Í 2023 eru tað 17 % av næmingunum, sum kenna seg happaðan.

Happing er tætt knýtt at trivnaði, og er tað nevniliga trivnaðin hjá børnum og ungum, ið eitt kommunalt tilboð kann og eigur at stuðla undir í tráð við barna -og ungdómspolitikkin hjá Eysturkommunu.

## 2.4 Alternativ til øktu skíggjanýtsluna

Kanning frá september 2024 gjørd av Epinion fyri Red Barnet og Trygfonden vísir, at **7 av 10 børnum í aldrinum 9 - 17 ár hava havt keðiligar upplivingar á netinum seinasta árið.**

Danski sálarfrøðingurin, David Madsen,  sum er serfrøðingur í avleiðingunum, sum sosialir miðlar hava á børn og ung, hugleiðir um kanningina.

Hann sigur, at nógv børn og ung reagera neiliga upp á tær ringu upplivingarnar, tey hava á netinum, men flestu av teimum fortelja tað ikki fyri nøkrum, serliga ikki fyri teimum vaksnu, vísir David  á.  Avleiðingarnar av hesum kunnu vera álvarsligar fyri barnið.

*"Det er min erfaring, at der opstår en stille mistrivsel. Der kommer en gradvis opblomstring af symptomer på depression og angst. Det er helt klart de ting, man kan se, når børn og unge efterlades alene på nettet", David Madsen, psykolog.*




David Madsen vísir eisini á, at hann sær børn og ung sum fáa PTSD eyðkenni av tí ógvusliga, tey síggja á netinum. Kanningin vísti, at tær 5 størstu keldurnar til keðiligar upplivingar eru:

1) Snapchat 49%

2) Tik Tok 20%

3) Instagram 14% ,

Discord og Roblox standa fyri 12% hvør.

( dr.dk Indland 10.09.24 “Ny undersøgelse: Syv ud af ti børn har haft ubehagelige oplevelser på nettet det seneste år”).

Hóast skíggjanýtsla hjá børnum er ábyrgdin hjá foreldrum, so eru hesi hagtøl eisini verd at hava í huga hjá kommununi, tá ið metast skal um, hvørt ungdómstilboð eigur at verða sett á stovn sum liður í fyribyrgjandi átaki innan sálarheilsu hjá børnum og ungum í Eysturkommunu. Ein stórur partur av teimum 30 % av børnum í Eysturkommunu, sum sita einsamøll heima eftir skúlatíð til foreldrini koma heim, kunnu væntast at nýta ein stóran part av tíðini framman fyri einum skíggja.

## Samanumtøka

Vit hava her gjøgnumgingið nakrar av høvuðsorsøkunum til og orsøkir fyri at seta kommunal frítíðartilboð á stovn. Nevnast kunnu hesar yvirskipaðu orsøkir:

- Styrkja felagsskapin millum børn og ung, har øll kunnu vera við undir skipaðum korum
- Lofta børnum og ungum, ið annars kunnu hava trupult við at gerast partur av felagsskapi
- Fyribyrgjandi átak í mun til ung, herverk og annan neiligan atburð
- At tey yngru børnini hava eitt trygt og gott stað at vera eftir skúla
- At tey ungu hava eitt trygt stað at hanga út um kvøldarnar
- Íløga í góða sálarheilsu hjá børnum og ungum
- Fyribyrgjandi átak móti mistrivnaði hjá børnum og ungum

## 3. Hvussu stórur er tørvurin á tilboði til 3. - 10. flokk?

Av tí at hagtøl og dáta annars um støðuna í Føroyum innan kommunal frítíðarvirksemi eru avmarkað, fara vit at gjøgnumganga nøkur hagtøl úr Danmark til íblásturs.

Støði verður tikið í tveimum kanningum, sum FOA, fakfelag hjá kommunalt settum í Danmark, hevur latið gjørt, ávikavist av børnum í aldrinum 6 - 9 ár í frítíðarskúla og børnum 10 - 13 ár í kommunalum frítíðartilboðum.

### 3.1 Luttøka hjá 0. - 3. flokki í frítíðartilboðum uttanlands

Í Danmark er vanligt við frítíðarskúla til 1. – 3. flokk, og síggja vit, at 71 % av øllum 3. floks børnum í Danmark ganga í frítíðarskúla. Hetta er staðfesti tørvurin í Danmark á tilboði til 3. floks næmingar.

**Figur 1**




Kilde: Statistikbanken og egne beregninger.

**Aðrar niðurstøður frá kanningini um 0. - 3. flokk:**

- Luttøkan hjá teimum 9-ára gomlu er ymisk frá kommunu til kommunu (frá 50 % - 90 %), har ymiska kostnaðarstøðið sýnist at hava stóra ávirkan
- Hóast inntøkan hjá foreldrunum ikki sýnist at ávirka luttøkuna, so vísir kanningin, at fyri tey 9-ára gomlu er galdandi, at har kostnaðurin er yvir 20.000 kr pr. ár eru 56 % í frítíðarskúla.
  Har kostnaðurin er undir 16.000 kr pr. ár er luttøkan 72 %.

### 3.2 Luttøka hjá 4. - 7. flokki í frítíðartilboðum uttanlands

Trý áhugaverd rák síggjast í luttøkuni hjá donskum børnum í kommunalum frítíðartilboði í aldrinum 10 - 13 ár.

1) Luttøkan fellur við aldrinum

2) Luttøkan er hægri, tá ið tilboðið liggur uttan fyri skúlan heldur enn partur av skúlanum
3) Børn, sum ganga til serfrálæru taka lut á jøvnum føti við hini børnini

**Figur 1**




Kilde: Statistikbanken.

**Aðrar niðurstøður frá kanningini um 4. - 7. flokk:**

- Í 2021 undir korona vóru 29 % av børnunum í aldrinum 10 - 13 ár í SFO (skole-og fritidsordning), ávikavist á frítíðarheimi og frítíðarklubba
- Luttøkan er hægri, tá ið frítíðartilboðið ikki er knýtt at skúlanum
- 62 % av teimum 10-ára gomlu ganga í frítíðartilboð, tá ið tilboðið **ikki** er á skúlanum, meðan luttakaratalið fellur til 41 %, tá ið tilboðið liggur inni á skúlanum
- Børn, ið ganga til serfrálæru, taka lut á jøvnum føti við hini børnini

Tølini úr Danmark vísa, at stórur partur av teimum ungu í 3. – 7. flokki taka lut í tilboði til aldursbólkin.

Í mun til kanningarnar úr Danmark er 8. – 10. flokkur ikki við í okkara kanning. Vit vita sostatt ikki, um luttøkan støðugt lækkar við aldrinum, ella kvinkar upp eftir.

## 3.3 Innihald og góðska á tilboðum

Danmark Evalueringsinstitut (EVA) hevur kannað innihaldið og góðskuna á donskum frítíðartilboðum til børn og ung 10 - 13 ár (3. – 7. flokk) gjøgnum spurnakanning til leiðararnar á frítíðartilboðum.

**Niðurstøður frá kanningini:**

- Samstarvið við skúlarnar er sera týðandi. Flestu leiðarar halda, at samstarvið styrkir um trivnaðin og menningina hjá børnunum
- 94 % av leiðarunum í frítíðartilboðunum svaraðu, at námsfrøðingar á tilboðunum eisini arbeiða á skúlunum
- Tað eru fakfólk sum lærarar og/ella námsfrøðingar, sum leiða tilboðini
- Hóast arbeitt verður miðvíst við at tryggja tann góða felagsskapin fyri øll, so eru altíð nøkur, sum sýnast at fella uttanfyri
- 14 % av leiðarunum á tilboðunum mettu, at reglur um talgilda nýtslu í stóran ella alstóran mun forða ávísum børnum at taka lut í frítíðartilboði. Forboð minkar luttøkuna.

## 3.4 Hvat siga børnini?

Keypmannahavnar kommuna spurdi fyri fyrstu ferð í 2023 øll teirra yvir 5000 børn frá 4. flokki og uppeftir, sum ganga í teirra frítíðartilboðum um, hvat teimum dámar tað.

**Niðurstøður:**

- Tað eru serliga børnini í 4. og 5. flokki, sum møta ofta, og so minkar tað í 6. og 7. flokki
- Børn, sum ofta ganga í frítíðarklubba hava tað sum heild betri enn tey, sum møta sjáldan
- 65 % siga seg hava fingið nýggjar vinir
- 71 % viðmerkja, at tá ið tey hava tørv á tí, er sum oftast, ella altíð, onkur vaksin at tosa við
- Børnini, sum ofta ganga í frítíðarklubba eru eisini glaðari fyri tilboðið – eingin kynsmunur sæst
- 8 av 10 dámar væl tey vaksnu, men 15 % siga, at tey vaksnu spyrja tey ikki, hvussu tey hava tað – geldur serliga børn, sum ikki hava tað so gott
- 2 % av børnunum, sum hava tað gott, siga seg ofta verða skeldað
- 29 % av børnunum, sum ikki hava tað gott, siga seg ofta verða skeldað
- 4 % av børnunum í frítíðarklubbunum kenna seg vera uttanfyri
- 16 % av børnunum kenna seg vera uttan fyri online felagsskapir uttan fyri frítíðartilboðið.

Hjá teimum, sum nýta frítíðartilboðini er luttøkan rættiliga høg, har áleið 80 % møta hvønn dag til fleiri ferðir um vikuna.

Tað er sera áhugavert at síggja, at børnini í størri mun kenna seg vera ein part felagsskapinum, sum er í klubbanum/ungdómstilboði, enn í teirra felagsskapum á netinum.

Tølini úr hesi kanning vísa, at hjá børnum, ið ganga í frítíðartilboði eru 4 %, sum onkuntíð ella altíð kenna seg at vera uttan fyri felagsskapin millum javnaldrar, meðan talið veksur til 16 %, tá ið umræður at gerast partur av talgildum felagsskapum millum javnaldrar, sí mynd niðanfyri




Í skipaðum frítíðartilboði er tað sostatt lættari hjá børnum at gerast partur av felagsskapinum, í mun til tá ið tey sita einsamøll við einum skíggja online.




Børnini í Keypmannahavn hava eisini svarað, hvat teimum dámar best at gera, tá ið tey eru í ungdómshúsi.

Her er góður íblástur at heinta, tí so stórur munur man ikki vera á teimum føroysku børnunum og teimum donsku.

Tað eru fimm aktivitetir sum serliga fáa høga raðfesting.




Sum vit eisini seinni funnu í royndunum úr Føroyum, so dáma børnunum sera væl bóltspæl.

Bestu aktivitetir eru sostatt bóltspæl, at gera okkurt kreativt, at hugna sær saman, telduspøl og at gera mat saman.

(Fritidsmiljøvurdering 26.06.23 - Fritidsklubber, Fagligt Center, Børne - og Ungdomsforvaltningen. Københavns Kommune)

## 4. Hvørji kommunal frítíðartilboð eru í Føroyum?

Frítíðartilboðini eru sera ymisk í Føroyum. Í verandi løtu eru eingi hagtøl fyri aldursbólkin í mun til, hvussu nógv børn eru limað inn í ymisk tilboð.

Vanliga verður málbólkurin deildur í 3. – 6. flokk og 7. – 10. flokk. Vit fara at hyggja nærri at hesum bólkum og teimum tilboðum, sum eru.

## 4.1 Ansing til tey yngstu

Tórshavnar kommuna hevur sum ein av fáum royndarkoyrt at víðka ansing frá 1. – 2. til eisini at fevna um 3. flokk. Henda ansing er nú vorðin ein fastur partur av veitingunum hjá kommununi, tó so at royndirnar í t.d. Hoyvík, á Argjahamri og á Margarinfabrikkini eru, at børnini í 3. flokki eru nakað vaksnari og hóska væl saman við 4. – 6. flokki heldur enn 1. og 2. flokki. Tað er eitt sindur ymiskt frá skúla til skúla í Tórshavnar kommunu, um ansing er til 3. flokk, ella tey fara á Margarinfabrikkina, har talan tó ikki er um ansing, men heldur um eitt ungdómshús.

Tá ið talan er um ansing merkir tað, at børnini vera ansað og ikki sjálv kunnu fara heim, tá ið tey vilja. Tey skulu heintast av foreldrunum. Ofta verður eitt slíkt tilboð nevnt frítíðarskúli ella frítíðarheim.

Tá ið talan er um frítíðartilboð (ikki ansing), tá koma og fara børnini, sum tey vilja sjálv. Tað er sjálvboðið hjá børnunum at møta og vera har.

Fyri uttan Tórshavnar kommunu, er ikki so vanligt at hava ansing til 3. flokk. Ansing avmarkar seg hjá flestu kommunum til 2. flokk, meðan frítíðartilboð á ymiskan hátt, ið líkist ungdómshúsi meira, verður nýtt til henda aldursbólk.

## 4.2 Frítíðartilboð/ungdómshús til børn og ung

Tað eru fleiri kommunur, sum velja at hava frítíðartilboð fyri 3. - 10. flokk, har tey yngru, tað eru 3. – 6. flokkur møtir beint eftir skúlatíð og nakrar tímar fram, hareftir tað er opið fyri teimum eldru í 6. – 10. flokki. Royndirnar eru, at tað riggar væl, at tey í 6. flokki kunnu velja, um tey eru saman við teimum yngru ella teimum eldru.

Í Klaksvík, Runavík og Sandavági eru dømi um frítíðartilboð (ikki ansing) til 3. - 10. flokk, meðan bygdir sum Strendur einki tilboð hevur til 3. – 5. flokk, men eitt ungdómshús til 7. – 10. flokk.

Arbeiðsbólkurin hevur verið í sambandi við fleiri kommunal frítíðartilboð til børn og ung í Føroyum fyri at hoyra teirra royndir, m.a. Frítíðartilboðið á Strondum, í Klaksvík, á Argjum, í Sandavági, í Hoyvík og á Margarinfabrikkini í Havn. Niðanfyri hava vit gjørt ein samandrátt av teimum viðurskiftum, sum ofta gingu aftur og vórðu nevnd av teimum, vit tosaðu við:

**Hølisviðurskifti og staðseting**

- Tað er týðandi við góðum fysiskum kørmum, tað merkir gott pláss, og fleiri høli at deila børnini í
- Staðsetingin skal vera mitt í bygdum øki, so at staðið er sjónligt. Tað forðar fyri, at óviðkomandi byrja at hanga út har
- Staðsetingin má vera við atgongd til høll ella vøll til bóltspæl. Sera týðandi, siga øll.
- Børnini vilja fegin hava sítt egna (frí) stað - ikki inni á skúlanum
- Tað er týðandi, at hølini ikki skulu deilast við annað virksemi, so tað ikki er neyðugt at rudda burtur tað, sum børnini havast við, tí okkurt annað virksemi skal vera har. Talan má vera um økið hjá børnum og ungum, sum tey eiga og kunnu búleikast í
- Tað er neyðugt, at hølini kunnu læsast, so at starvsfólkið hevur stýr á, hvar tey ungu eru og kann avmarka teirra atgongd til t.d. onnur høli í húsinum

- Viðmælt verður, um gjørligt, at hava matarskipan, so børnini kunnu keypa sær okkurt at eta, tá ið tey koma svong úr skúla

**Starvsfólk**

- Neyðugt er at hava vaksin og greið starvsfólk, aldur umleið 23+ er týðandi, so tey megna at lofta teimum ungu og at seta greið mørk
- Tað er til fyrimuns at hava fakfólk at standa fyri tilboðnum og sum part av starvsfólkahópinum
- Av tí at tilboðini eru undir skipaðum kørmum við professionellari leiðslu, so hevur tað gjørt tað gjørligt hjá børnum og ungum at tikið lut, sum annars hava trupult við sjálv at gerast partur av felagsskapi
- Týðandi, at starvsfólk tíma og duga væl við børnum og ungum, tað má gjarna verða aldursspjaðing í starvsfólkahópinum
- Tilboðini mugu veita eitt trygt og rúsfrítt umhvørvi til børn og ung
- Boðini frá SSP og politinum eru, at tað eru stórir fyribyrgjandi ágóðar í mun til tey ungu við slíkum tilboði. Tað fyribyrgir herverki, drekkarí og øðrum neiligum atburði og økir sum heild um trivnaðin
- Gjørligt er at samstarva við Almannaverkið  - har Almannaverkið ber kostnaðin av stuðulstímum, sum verða veittir av starvsfólkunum í tilboðnum til børn við tørvi á eyka stuðli. Samlað gevur tað fleiri hendur til tilboðið

**Innihald**

- Týðandi við góðum innihaldi – her er ymiskt, hvussu skipað tilboðini eru, frá sera skipað til laissez-faire
- Innihaldið er sera fjøltáttað. Bóltspæl, kreativ verkstøð, pizzahugni, hyggja landsdyst, baka o.s.fr.
- Tað er sera týðandi at hava atgongd til høll og/ella vøll til bóltspæl
- Týðandi við atgongd til køk, har gjørligt er at gera mat saman
- Børnini eru ikki so spent at fara túrar til aðrar bygdir, ella til átøk uttanfyri ungdómstilboðið
- Børnunum dámar væl at hava eitt stað at hanga út og hugna sær saman, sum er teirra.

**Annað**

- Tað er ymiskt, hvussu nógv áherðsla verður løgd á at arbeiða út frá yvirskipaðum virðum ella málsetningum
- Royndirnar eru, at børnini møta væl upp á teim tilboðum, vit hava tosað við
- Øll arbeiða fram móti einum jaligum og mennandi tilboð til børnini, sum er fevnandi, og har øll kunnu vera við
- Um matur verður seldur til børnini uttan vinning fyri kommununa, eru ikki herd krøv til industrikøk v.m.

## 5. Eysturkommuna

Ein av uppgávunum hjá arbeiðsbólkinum hevur verið at greina, um tørvur er á fleiri ella øðrvísi frítíðartilboðum í Eysturkommunu.

Eitt líknandi arbeiði var gjørt í 2009, og tað fara vit at hyggja at her, áðrenn úrslitini frá greiningini í 2024 verða lýst.

## 5.1 Støðan á barna- og ungdómsøkinum í 2009

Í 2009 varð ein arbeiðsbólkur settur at kanna møguleikan fyri einum frítíðartilboði til 12 - 17 ára gomul. Niðan fyri sæst arbeiðssetningurin og teirra tilmæli eftir 4 mánaðar kanningar og vitjanir á Húsinum í Klaksvík, tilboðnum í Vestmanna og Margarinfabrikkini í Havn.

Sí brot úr skrivinum hjá arbeiðsbólkinum í 2009.

Vit fingu soljóðandi arbeiðssetning:

***Hvussu skipa vit eitt stuttligt og mennandi stað fyri ung (12-17 ár), har pláss er fyri øllum, í einum rúmligum og rúsfríum umhvørvi. Hvat eigur eitt tílíkt stað at bjóða og geva møguleikar fyri.***

Vit skjóta upp, at staðið verður fyri børn og ung frá 7. skúlaári t.v.s. 13/14 ár - til og við 17 ár. Vit meta, at børn frá 7.skúlaári hava tørv á einum slíkum staði og at vit skapa eitt ungdómshús, men ikki ein ansingarstovn.

Í løtuni eru 111 børn í hesum aldursbólki í Eysturkommunu.

Vit skjóta upp at ungdómshúsið hevur opið frá kl. 19 - 23.

Arbeiðsbólkurin kom eisini fram til, at tørvur er á hølum, ið eru 300 - 400 fermetrar, men fann ikki í táverandi støðu hóskandi høli í kommununi at viðmæla og mæltu tískil til, at bygd vórðu nýggj høli til endamálið.

## 5.2 Støðan á barna- og ungdómsøkinum í 2018

Undir heitinum "Børn og ung – okkara felags ábyrgd", orðaði Eysturkommuna ein barna- og ungdómspolitikk við støði í drúgvari tilgongd, har allir hugsandi áhugapartar, bæði børn og vaksin vórðu hoyrd.

Politikkurin leggur stóra áherðslu á heilsu og trivnað og nevnir millum annað:

*"Við sínum savnandi eyðkenni vil kommunan heiðra ymiskleikan og skapa karmar fyri, at øll børn og ung verða stuðlað at brúka síni evni. Kommunan vil harumframt við opinleika og vinalagi tryggja børnum og ungum at tey verða sædd, hoyrd og vird".*

Greitt er, at Eysturkommuna longu hevur sett sjóneykuna á økið børn og ung og kann vera, at henda kanning kann geva íblástur til eitt tilboð, sum stuðlar undir og veitir góðar karmar til øll børn í aldrinum 3. - 10. flokk, hóast tillaging í mun til verandi, har einki kommunalt tilboð er til hendan bólk. Í politikkinum stendur eisini:

*Í Eysturkommunu verður miðað ímóti , at skipaðir karmar um børn og ung støðugt verða tillagaðir.*

## 5.2 Støðan á barna- og ungdómsøkinum í 2024

Arbeiðsbólkurin hevur kannað tørvin á ungdómsøkinum í Eysturkommunu. Bólkurin hevur havt samrøður við tey, sum standa fyri verandi ítróttar- og frítíðartilboðum í kommununi um spurt, um tey síggja nakran tørv á barna- og ungdómsøkinum, sum ikki verður fevndur av verandi tilboðum.

Í øðrum lagi hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina talgilda spurnakanning, sum er send øllum foreldrum at børnum í 3. - 10. flokki í kommununi.

## 5.3 Hvat siga tey sjálvbodnu í Eysturkommunu?

Arbeiðsbólkurin hevur spurt seg fyri hjá kvøldskúlalærarum umboðandi: drama, gittar, klaver, talv, umframt umboð fyri fótbóltin og átrúnaðarligar felagsskapir.

Yvirskipað viðmerkja tey, at 6. flokkur og eldri eru trupul at fáa við í verandi tilboð. Tey fella frá. Royndirnar frá økinum eru, at tá ið børnini nærkast tólv árum, byrja tey at fella frá frítíðartilboðum.

Tí hevði verið gott við tilboði til tey eldru børnini, verður nevnt í hesum høpi.

Ein annar bólkur, sum verður nevndur, eru tey, sum hava skerdar sosialar førleikar. Her sóknast fólk eisini eftir einum skipaðum kommunalum tilboði.

## 5.4 Hvat siga foreldrini at børnum í 3. - 10. flokki – Spurnakanning aug. 2024

Ein av høvuðsuppgávunum hjá arbeiðsbólkinum var at finna útav, um tørvur er á fleiri frítíðartilboðum til børn og ung í Eysturkommunu.

Fyri at svara hesum spurningi gjørdi arbeiðsbólkurin av at spyrja foreldrini at børnum og ungum í kommununi frá 3. - 10. flokki um, hvat tey halda.

Luttøkan í talgildu kanningini var sera høg og harav eru úrslitini eisini eftirfarandi.

Sum sæst í yvirlitinum niðanfyri, so eru flokkarnir væl umboðaðir, 10. flokkur tó undantikin, har einans 4 svar komu inn.

Foreldrini vórðu biðin um at svara eina ferð pr. barn.

| Flokkur | Næmingatal | Svar frá foreldrum | Svarprosent í mun til næmingatal |
|---|---|---|---|
| 3. flokkur | 37 | 26 | 70% |
| 4. flokkur | 39 | 25 | 64% |
| 5. flokkur | 31 | 20 | 65% |
| 6. flokkur | 31 | 14 | 45% |
| 7. flokkur | 37 | 22 | 59% |
| 8. flokkur | 35 | 22 | 63% |
| 9. flokkur | 28 | 17 | 61% |
| **í alt:** | **238** | **146** | |

### 5.4.1 Úrslit frá spurnakanningini í Eysturkommunu 2024:

Niðan fyri fara vit at gjøgnumganga spurningarnar, ið foreldrini hava fingið og fara at vísa á nakrar viðmerkingar, sum foreldrini eru komin við í kanningini.

### 5.4.2 Hvørjum er barnið sum oftast saman við eftir skúla, inntil tit koma heim frá arbeiði?

Tað kom óvæntað á arbeiðsbólkin, at heili 30% av børnunum sita einsamøll heima, inntil foreldrini koma heim frá arbeiði. Fleiri foreldur nevna júst hetta sum orsøk til, at tey meta tilboð mangla í kommununi, har børnini kunnu fara, tá ið tey eru liðug í skúla.




Reyði liturin vísir børn, ið eru saman við familju ella vinum. Her kann eisini vera talan um systkin, sum eru heima til foreldrini koma heim. Niðanfyri sæst býtið av svarum og viðmerkingar frá foreldrunum.

**Viðmerkingar frá foreldrum:**

- *”Her manglar eitt stað fyri børn aftaná 2. flokk. Tað kunnu gerast nógvir tímar, har systkin sita heima og bíða til foreldrini koma til hús.”*

- *”Eg haldi, tey eru for ung at vera einsamøll heima, tá tey ganga í triðja. Og so haldi eg tað hevði verið gott við slíkum tilboði til allan aldur (triðja og upp), har tey kunnu koma, um eingin er heima, ella tey bara hava hug til annað enn at “sumpa” heima.”*

- *Eitt stað har børnini kunnu vera í felagsskapi eftir skúlatíð, serliga tá tey hava tíðliga frí. So tey ikki eru einsamøll heima frá t.d. kl. 12-16/16.30. Um mann vil tað ella ei, so førir tað ofta til, at mann bara brúkar skerm (hóast forboð og reglur heimanífrá).*

### 5.4.3 Gongur barn títt til ítrótt ella annað frítíðarítriv?

17 % av børnunum ganga ikki til nakran ítrótt ella frítíðarítriv.  Hetta er møguliga bólkurin av børnum og ungum, ið eitt frítíðartilboð serliga miðar ímóti at fáa við. Hetta viðmerkja fleiri foreldur eisini.




**Viðmerkingar frá foreldrum:**

- *”Ja, tað manglar tilboð til børn, sum ikki ganga til ítrótt. Tað kundi verið eitt frítíðartilboð sum t.d Húsið í Klaksvík. ”*

- Foreldur eftirlýsir: ”*Eitt stað har tey kunnu vera undir uppsýn av vaksnum fólki, so tey, sum ikki ganga til nakað kunnu vera. Soleiðis kunnu tey fáa innihald í gerandisdagin. Og soleiðis kunnu*

*herverk, bólkar og bólkatrýst fyribyrgjast. Men tað má vera eitt breitt tilboð, sum fevnir øll, sum hava ymisk áhugamál "*

- "Her er bert fótbóltur og spælipláss. Um ein er 13 ár og ikki spælir fótbólt, so er einki"
- *"Um mann ikki sparkar, so er gott við onkrum alternativi. Ungdómshús er væl dámt"*

### 5.4.4 Hvussu metir tú útboðið av frítíðartilboðum vera í kommununi?

Til hendan spurning svara foreldrini:
34% eru væl nøgd, 35% eru miðal nøgd og seinastu 31% kundu ynskt meiri fjølbroytni.



**Viðmerkingar frá foreldrum:**

- *"Eitt økið har børnini kunnu standa á rullifjøl, rennihjóli og BMX. Eitt barna- og ungdómshús. Aðrar ítróttargreinar sum t.d. hondbóltur og flogbóltur".*
- *"Manglar okkurt tilboð til børn við serligum tørvi"*.
- *"Møguliga eitt ungdómshús og fleiri spælipláss runt um í bygdunum, sum leggja natúrligt upp til meira rørslu og uttanduraspæl".*
- "Tiltøk, sum eru av og á, t.d. borðspælskvøld, být-um-marknaður, kreativar verkstovur".

### 5.4.5 Manglar eitt alternativ til verandi barna -og ungdómstilboð í kommununi?

Tað sýnist at vera breið semja millum foreldrini um spurningin, hvørt tað manglar eitt alternativ til verandi barna- og ungdómstilboð í Eysturkommunu.

7. Manglar eitt alternativt tilboð til verandi barna - og ungdómstilboð í kommununi?




Her svara 79 % at tey halda, at tað manglar eitt alternativ til verandi barna- og ungdómstilboð í kommununi, meðan ein minniluti á 21% svara "nei".

Av teimum 79% av foreldrunum ið halda, at tað mangla frítíðartilboð í Eysturkommunu, ynskja:

- **80% eitt virkishús/ungdómshús**
- 14% fleiri kreativ tilboð
- 14% fleiri ítróttargreinar

Tað komu 118 viðmerkingar inn til spurningin, herav var tað 2/4 av svarunum hjá 10. floks børnum, sum serstakt nevndu ynski um eitt ungdómshús, tá ið spurningurin varð settur: ”Um Ja, hvat manglar?”.
Her koma fleiri av teimum 118 svarunum:

**Viðmerkingar frá foreldrunum:**

- *Ungdómshús*
- *”Ja, tað skuldi verið eitt stað, har børnini kundu hitst fleiri ferðir um vikuna, tá ið tey ikki eru til ítrótt ella annað”.*
- Eitt frítíðartilboð, har vaksin fólk eru um børnini.
- *”Her manglar ungdómstilboð, har tannáringar kunnu hittast og hugna sær trygt. Serliga eftir náttverðatíð. Eisini manglar SFO eftir 2. flokk. Tey eru alt ov ung at sita heima í tímavís einsamøll 9-ára gomul! Sjálvandi skuldi 3. fl hoyrt til tilboðið á Gásamýri.”*
- *”Eitt ungdómshús hevði verið hóskandi fyri eina so stóra kommunu”.*

Við støði í hesum stendur tað rættiliga greitt, at stórur eftirspurningur er eftir einum virkishúsi ella ungdómshúsi til børn og ung í Eysturkommunu.

## 6. Tilmæli frá arbeiðsbólkinum

Við støði í gransking, kanningum og ikki minst spurnakanningini í Eysturkommunu, er niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum fylgjandi:

**Tilmæli okkara er:** At kommunan setur á stovn eitt barna -og ungdómshús, eitt virkishús til aldursbólkin 3. - 10. flokk.

**Vit viðmæla harumframt hesi viðurskifti:**

- Mælt verður til, at eitt virkishús (ikki ansing) verður sett á stovn til flokkarnar 3. - 10. flokk í Eysturkommunu
- At opið er fyri 3. – 6. flokki eftir skúlatíð til kl. 17.00
- At opið er fyri 6. – 10. flokki kl. 19.00 - 22.00 mitt í viku og til kl. 23.00 fríggjakvøld.
- At virkishúsið er mannað við fakfólki og greiðum, vaksnum fólki við royndum innan økið børn og ung.
- At kommunan ger eina heilsugóða matarskipan eftir skúlatíð til børnini, har tey kunnu gera mat saman við teimum vaksnu og fyri lítlan kostnað kunnu keypa sær millummála, eins og t.d. í Sandavági.
- At staðsetingin av virkishúsinum ikki verður á einum skúla.

- At staðsetingin verður mitt í bygdini og mitt í kommununi, tó so at trivnaðarnevndin kann kanna nærri, um tað kundi verið til fyrimuns at fylgt leistinum í Sandavági, har høli verða nýtt í fleiri bygdum, m.a. ein garasja at ordna skutarar við í tí einu bygdini.
- Løtt atgongd til høll ella vøll er sera týðandi. Staðsetingin má vera tætt við høll ella vøll.
- At hølið er min. 350 $m^2$ og at gjørligt er at læsa hæddir og øki av.
- At virkishúsið er eitt rúsfrítt umhvørvi.
- At innihaldið í virkishúsinum leggur seg upp at best dámdu aktivitetunum hjá teimum ungu í Københavns Kommunu, tó lagað til føroysk viðurskifti og føroyska mentan.
- At virkishúsið hevur tætt samstarv við skúlan í kommununi.
- At leiðsla verður sett til virkishúsið, ið stendur fyri arbeiðinum at fáa eitt tilboð sett í verk í samstarvi við kommununa. Viðmælt verður, at kommunan fær sær íblástur úr Sandavági, ið hevur havt eina vælskipaða og væleydnaða tilgongd av teirra frítíðartilboði til børn og ung.

## 6.1 Tilmæli til hølisviðurskifti:

Við støði í royndunum frá frítíðartilboðum í Føroyum og Danmark, verður gjørt tilmæli um høli til eitt frítíðartilboð í Eysturkommunu.

**Tilmæli:** Mælt verður til at keypa PE í Norðragøtu at gera um til virkishús til børn og ung. Mett verður, at hølini við fyrimuni kunnu verða lagað til og umvæld yvir eitt 5-ára skeið til endamálið.

**Grundgeving fyri at keypa PE til endamálið:**

- Tað liggur miðskeiðis í kommununi
- Tað liggur miðskeiðis í Norðragøtu í bygdum øki – eins og m.a. Margarinfabrikkin mælti til, tí tað forðar fyri, at ókunnugfólk gera sær dælt av teim ungu, selja rúsevni og/ella annað
- Tað er nóg stórt í mun til kanningina, ið kommunan læt gera í 2009 og er í hæddum, ið kunnu læsast av, sum m.a. Argjaskotið, Húsið og Margarinfabrikkin viðmæltu
- Til húsið er garasja, har møguleiki kann vera fyri "skutara café" sum í Sandavági, har tey ungu læra seg at skrúva skutarar og súkklur
- Tað liggur tætt við vøllin til bóltspæl – er sera týdningarmikið, sum allir hoyrir partar hava viðmælt
- Tey ungu kenna økið og eru von at vera har
- Har er løtt atkoma frá øllum bygdum í kommununi við t.d. góðum busssambandi
- Tað gevur lív í bygdina

.

**Onnur boð uppá høli:**

Valhøll, Tøting og Bakkabúðin eru góð alternativ, nóg stór at hýsa einum ungdómshúsi og liggja væl fyri og kunnu við tillagingum og broytingum lúka tey viðurskifti, ið eru nevnd at hava týdning fyri eitt ungdómshús.

Viðmælt verður, at kommunan kannar, um hesi kundu verið tøk til eitt virkishús/ungdómshús.

Um PE, Valhøll, Tøting ella Bakkabúðin ikki eru ein møguleiki, kann arbeiðsbólkurin viðmæla býráðnum at gera eina virkisvitjan til frítíðartilboði í Sandavági. Teirra ungdómshús er staðsett í trimum bygdum, har høli

eru til ymisk endamál, har opið er upp á skift.  Millum annað við garasju til skutarar og súkkluumvæling í tí einu bygdini.

## 6.2 Manning av tilboði  - Normering úr Danmark til íblásturs

Í Danmark hevur man kannað normeringina í frítíðartilboðum fyri alt landið, og skulu vit her hyggja at teirra niðurstøðum til íblásturs.

Til og við 3. flokk er normeringin 16,2 innskrivað børn pr. námsfrøðiliga starvsfólk, men tá er eisini talan um ansing.  Tá ið talan ikki er um ansing, men frítíðartilboð fyri 4. – 6. flokk eru 21,6 børn pr. vaksin.

Áðrenn umhugsað verður at seta tilboð stovn, er neyðugt hjá kommununi at hyggja nærri at hesum parti í mun til tørv og fíggjarlig viðurskifti, so greinast kann, hvørja fíggjarliga avleiðing ein slík loysn kundi havt fyri kommununa. Avgjørt var frá kommununnar síðu, at hesin partur ikki skal greinast av verandi arbeiðsbólki, tí hetta verður partur av eini víðari greining, um so er, at politiski myndugleikin í Eysturkommunu velur at arbeiða víðari við málinum at seta frítíðartilboð á stovn.

Royndirnar úr t.d. Sandavági og av Argjum vísa, at um tað ikki eru nóg nógv starvsfólk, so kann tað ganga heilt galið. Í báðum førum hjálpti tað at seta fleiri hendur at vera um børnini til tilboð, sum ikki koyrdu so væl.

Boks 1.1 opsummerer de beregnede normeringer.

**Boks 1.1** **Normeringsberegninger for fritidstilbud:**

- Normeringsberegningen for førskolebørnene kl. 11.00:
  7,5 indskrevne børn pr. planlagt pædagogisk personale.
- Normeringsberegningen for alle børn kl. 14.45:
  18,1 indskrevne børn pr. planlagt pædagogisk personale.
- Normeringsberegningen for førskolebørnene kl. 14.45:
  11,6 indskrevne børn pr. planlagt pædagogisk personale.
- Normeringsberegningen for børnehaveklasse-3. klasse kl. 14.45:
  16,2 indskrevne børn pr. planlagt pædagogisk personale.
- Normeringsberegningen for 4.-6. klasse kl. 14.45:
  21,6 indskrevne børn pr. planlagt pædagogisk personale.

Kelda: Vive "*Normeringer i fritidstilbud – spørgeskemaundersøgelse om normeringen i danske fritidstilbud 31. maj 2022".*

## Samanumtøka

Vit hava í hesum skrivi fingið staðfest, at frítíðartilboð serliga verða nýtt at menna børn og teirra felagsskapir. Frítíðartilboð vera eisini nýtt sum amboð at lofta teimum børnum, sum ikki eru virkin í frítíðini og/ella illa megna at gerast partur av felagsskapum við teirra javnaldrar. Her verður eisini stór áherðsla løgd á, at einki trýst, kapping ella avrik er neyðugt fyri at taka lut í kommunalum frítíðartilboði. Talan er um ein frístað til børn og ung við vaksnum, sum stýra og seta góðar karmar fyri øll.

Ágóðar av góðum og væl skipaðum kommunalum frítíðartilboði:

- Styrkir felagsskapin millum børn og ung, har øll kunnu vera við undir skipaðum korum
- Fyribyrgjandi átak í mun til ung, herverk og annan neiligan atburð
- Íløga í góða sálarheilsu hjá børnum og ungum (***ver virkin, ver saman, ver hugbundin***)
- Loftar børnum og ungum, ið annars kunnu hava trupult við at gerast partur av felagsskapi
- At børnini hava eitt trygt og gott stað at vera eftir skúlatíð, so tey ikki sita einsamøll heima (á netinum)
- At tey ungu hava eitt trygt stað at hittast um kvøldarnar
- Fyribyrgjandi átak móti mistrivnaði hjá børnum og ungum

**Úrslit frá spurnakanningin í Eysturkommunu 2024 um 3. - 10. flokk:**

- 30 % av børnunum eru einsamøll heima eftir skúla, inntil foreldrini koma heim frá arbeiði
- 17 % av børnunum ganga ikki til ítrótt ella annað frítíðarvirksemi
- 31 %  av foreldrunum meta, at útboði av verandi frítíðartilboðum kundi verið meira fjølbroytt
- 79 % av foreldrunum halda, at tað mangla frítíðartilboð í Eysturkommunu

Av teimum 79 % av foreldrunum, ið halda, at tað mangla frítíðartilboð í Eysturkommunu, ynskja:

- **80 % eitt virkishús/ungdómshús**
- 14 % fleiri kreativ tilboð
- 14 % fleiri ítróttargreinar

Meginparturin av foreldrunum at børnum í 3. - 10. flokki í Eysturkommunu ynskja at fáa eitt virkishús/ungdómshús í kommununa. Hetta, so at teirra børn ikki skulu sita einsamøll heima eftir skúlatíð í nógvar tímar. Eisini sóknast foreldrini eftir einum staði til tey børn, sum ikki ganga til ítrótt ella annað, so hesi eisini kunnu gerast partur av felagsskapinum í frítíðini við teirra javnaldrar.

Vit hava fingið staðfest eina neiliga gongd hjá teimum ungu í Eysturkommunu, sum alsamt gera herverk og líknandi og sum trupult hevur verið at funnið eina loysn uppá. Her hava royndir aðrastaðni víst, at eitt væl skipað ungdómshús er eitt gott fyribyrgjandi átak.

Øll hesi viðurskifti saman við teimum kanningum og gransking, sum er løgd fram um skíggjanýtslu, trivnað og happing, stuðla undir tilmælið frá arbeiðsbólkinum um, at kommunan setur á stovn eitt virkishús/ungdómshús til 3. - 10. flokk í Eysturkommunu.

Í kanningini síggja vit, at børnini ikki fara út og spæla eftir skúlatíð í sama mun eins og fyrr. Í staðin situr áleið triðja hvørt barn einsamalt heima, til foreldrini koma heim. Gongdin stuðlar ikki undir góða sálarheilsu, trivnað ella at vera partur av einum felagsskapi.

Tilmælið leggur sostatt upp til, at kommunan ger eina íløgu í góða sálarheilsu, trivnað, menning og fyribyrging hjá børnum og ungum.  Kommunan hevur breiða undirtøku frá foreldrunum, har áleið 80 % ynskja eitt tilboð til 3. - 10. flokk í Eysturkommunu.

Tilmælið er eisini í tráð við framsøkna málsetningin hjá kommununi orðað í Barna og Ungdómspolitikkinum frá 2018, har stendur at:

***"Í Eysturkommunu verður miðað ímóti , at skipaðir karmar um børn og ung støðugt verða tillagaðir.. Eysturkommuna vil ganga undan á barna -og ungdómsøkinum, og vil velja nýggjar og djarvar loysnir."***
(Barna-og Ungdómspolitikkur 2018, Eysturkommuna)

Við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum verður lagt upp til eina neyðuga tillaging og munandi betran av verandi kørmum hjá børnum og ungum hjá Eysturkommunu.

Sum Eysturkommuna skrivar á heimasíðu síni:    **"Børn og ung eru umleið ein triðingur av íbúgvunum, men øll okkara framtíð".**